# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 30.10.2025 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fugløl<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Tórur Didrik Djurhuus<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 53/25 | 25/00363-4 | Umsókn um byggiloyvi til nýbygging av sethús, bilhús/bilskýli, matr. nr. 68 92b, Norðragøta | 2 |
| 54/25 | 25/00461-2 | Marknaðarumskipan av parti av matr. nr 169a at leggja aftrat matr. nr. 169v | 3 |
| 55/25 | 25/00462-3 | Sundurbýti av parti av matr. nr. 187a til kappróðraneystið | 4 |
| 56/25 | 25/00464-1 | Broyting av býarplani við Gøtugjógv matr.nr. 2 | 5 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 53/25 Umsókn um byggiloyvi til nýbygging av sethús, bilhús/bilskýli, matr. nr. 68 92b, Norðragøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.10.2025 | 27/25 | 25/00363-4 |
| 2 Býráðið | 30.10.2025 | 53/25 | 25/00363-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn dagfest 13. August 2025, um at byggja eitt bilhús á matr. nr. 92b í Norðragøtu. Bilhúsið liggur út mótið vegnum Við Ánna í Norðragøtu.<br><br>Sambært galdandi byggisamtykt fyri økið, er tað ikki nøkur forðing fyri at byggja bilhúsið, sum sigur at byggjast kann 5 metur frá vegnum.<br><br>Sum sæst á kortinum, so hevur ikki verið bygt nærri enn 10 metur frá vegnum. Ein orsøk til hetta kann vera, at hesin vegurin hevði funktión sum landsvegur, áðrenn nýggi landsvegurin kom í 70'inum . Tað er tó eitt bilhús bygt, hetta byggiloyvi var útgivið í 1979.<br><br>Við atlit til ferðsluna kann tað gerast trupult við innkoyringum, sýni o.a. um tað koma fleiri bilhús fram Við Ánna, umframt at granna missa útsýni.<br><br>Støða skal takast til um man vil varðveita økið sum tað er, so eigur hetta at takast við í byggisamtyktina, |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, ikki at geva byggiloyvi og at varðveita økið sum tað er og broyta byggisamtyktina fyri økið. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. oktober 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum við at seta ein 10 metur linju frá vegnum.

Uni Rasmussen tekur støðu á Býráðsfundinum.

**Býráðið 30. oktober 2025**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Magnus Skoralíð, Hanna Jensen, Ann Fuglø, Heri Mikálsson Pól í Skorini, Unn Jarnskor Ellingsgaard,Tórur Didrik Djurhuus

**Atkvøddi blankt:**
Uni Rasmussen

## 54/25 Marknaðarumskipan av parti av matr. nr 169a at leggja aftrat matr. nr. 169v

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.10.2025 | 28/25 | 25/00461-2 |
| 2 Vinnunevndin | 21.10.2025 | 8/25 | 25/00461-2 |
| 3 Býráðið | 30.10.2025 | 54/25 | 25/00461-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við byggingina av Lugarinum í Leirvík hevur bygningurin, sum liggur aftan fyri Lugarin, ikki fingið sín egna matrikul.<br><br>Ætlanin er at marknaðarumskipa hetta økið soleiðis, at nevndi partur av bygninginum fær sítt egna matrikul. Talan er um uml. 60 fermetrar, sum verður tikið av matr. nr. 169a og lagt sum nýtt matr. nr. 169v, ið samsvarar við bygningin.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við marknaðarumskipanini. |

**Vinnunevndin 21. oktober 2025**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. oktober 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. oktober 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

## 55/25 Sundurbýti av parti av matr. nr. 187a til kappróðraneystið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.10.2025 | 29/25 | 25/00462-3 |
| 2 Vinnunevndin | 21.10.2025 | 9/25 | 25/00462-3 |
| 3 Býráðið | 30.10.2025 | 55/25 | 25/00462-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Kappróðarneystið sum er bygt í havnalagnum í Norðragøtu og liggur á matr. nr. 187a í er umleið 30.500 fermetrar.<br><br>Ætlanin er at sundurbýta kappróðraneystið frá matr. nr. 187a, soleiðis at kappróðranesytið fær egnan matrikul.<br><br>Bygningurin er umleið 322 fermetrar.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at sundurbýta kappróðraneystið til egnan matrikul. |

**Vinnunevndin 21. oktober 2025**
Vinnunevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 22. oktober 2025</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 30. oktober 2025</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

## 56/25 Broyting av býarplani við Gøtugjógv matr.nr. 2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.10.2025 | 30/25 | 25/00464-1 |
| 2 Býráðið | 30.10.2025 | 56/25 | 25/00464-1 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur ætlanir, um at broyta býarætlanina fyri part av matr. nr. 2 við Gøtugjógv, sum í løtuni er skrásett sum øki H – Frílendi, við tí endamáli at broyta hetta til øki B – Bústaðarøki.

Upprunin til málið, er at tað kann verða trupult at skaffa lendi til bústað við Gøtugjógv.
Kommunan metir, at nevndi partur av matr. nr. 2 er væl egnaður til bústaðarendamál. Í býarskipanarligum høpi er økið somuleiðis væl egna at nýta til bústaðir, tí bæði vegur, kloakk o.a. longu eru løgd fram til hetta økið við Gøtugjógv.

Hendan broyting er ein liður í ætlan kommununnar um at tryggja møguleikan fyri fleiri bústaðum í Gøtugjógv.

Broytingarnar fevna um:
At broyta ein part av matr. nr. 2 frá H - Frílendi til B - Bústaðarøki.

Sí skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

15.000,- kr.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at gera hesar broytingarnar í býarplaninum við Gøtugjógv.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. oktober 2025**
Byggi- og býarsikipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. oktober 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

fundurin lokin kl. 18.00

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Ról í Skorini

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen